# Hanus Kamban í Norðurlanda-húsinum

## Tað nýggja søgusavnið GULLGENTAN verður lagt fram 21. oktober kl. 16

Hósdagin tann 21. oktober kl. 16 verður bókin GULLGENTAN eftir Hanus Kamban løgd fram í Norðurlandahúsinum.

Rithøvundurin hevur tað seinasta árið hildið til í býnum Freiburg í Suðurtýsklandi. Býurin liggur í statinum Baden-Württemberg, við at kalla 11 milliónum av íbúgvum. Freiburg er ein sokallaður "grønur" býur, við góðum sporvognsneti, stórum bilfríum miðøki og reinum vatni, skolandi gjøgnum veitir í høvuðsgøtunum. Freiburg fekk fyri nøkrum árum síðani eina europeiska virðisløn fyri sína fagurfrøðiliga og umhvørvisliga fráliku býarskipan. Borgmeistarin er jødi.

GULLGENTAN er eitt savn við tíggju stuttsøgum. Tær flestu av søgunum eru skrivaðar í Freiburg, stuttan tein frá, har skógurin Schwarzwald tekur við. Tekstirnir umboða eina snaring í Hanusar søgukynstri, soleiðis at skilja, at lesarin í teimum verður leiddur út ígjøgnum veruleikans dyr – og inn í dreym, søgn, ævintýr og framtíð.

Permumyndin er eftir ta ungu listakvinnuna Silju Strøm, sum somuleiðis hevur tríggjar myndir inni í bókini.

Tiltakið er skipað soleiðis, at høvundurin fyrst sigur nøkur orð um býin Freiburg, har hann nemur stutt við mentan og heimspeki og við tann serliga týska áhugan fyri Norðurlondum.

Síðani sigur hann nøkur orð um bókina. Tekstirnir í GULLGENTUNI eru ógvuliga ymiskir, men aftan fyri teir eru nøkur yvirskipað motiv og tankamynstur, sum neyvan við fyrsta lesnaðin eru so sjónlig, men sum gera bókina til eina heild. Nøkur av hesum motivum tekur høvundurin fram í síni umrøðu. Til seinast lesur hann nøkur brot upp, og at enda fáa fólk høvi til at seta spurningar.

Fólk fáa somuleiðis høvi til at keypa bókina fyri ein lagaligan prís. Um fólk vilja, setir høvundurin sín autograf í bókina.

Øll eru vælkomin. Tiltakið, sum er ókeypis, varar o.u. ein tíma.





# Fýra føroyskir úrmælingar framføra Árstíðirnar

## Sámal Petersen, Øssur Bæk, Rúni Bæk og Rúni Sørensen allir leikandi á violin framføra í næstum saman við strúkarunum í Føroya Symfoniorkestri, tvær forkunnugar konsertir í ávíkavist Christianskirkjuni og Vesturkirkjuni

**Føroya Symfoniorkestur**

Konsertirnar verða leygardagin 23. oktober í Christianskirkjuni klokan 1600 og í Vesturkirkjuni sama dag klokkan 2000. Á skránni eru árstíðirnar eftir Antonio Vivaldi, Chacony eftir Henry Purcell, Air eftir J. S. Bach, Sæterjentens Søndag eftir Ole Bull og Chanson de Nuit eftir Edward Elgar.

Í árstíðunum av Vivaldi fara vit at møta fýra føroyskar violinsnidlingar, sum fara at spæla soloirnar í verkinum. Sámal Petersen spælir várið, Øssur Bæk summarið, Rúni Bæk heystið og Rúni Sørensen veturin. Teir eru allir violinistar, har tann fyrsti er konsertmeistari fyri FSO, Øssur er leiðari av Vestjysk Ensemble, Rúni er limur í Danmarks Radios Symfoniorkester og Rúni Sørensen er konsertmeistari og leiðari av Sjællands Symfoniorkester. Saman við teimum spælir partur av strúkarunum í Føroya Symfoniorkestri.

### Um árstíðirnar og Antonio Vivaldi (1678-1741)

Vivaldi var prestur og violinleikari. Hann var nevndur il preto rosso, reyði presturin, tí hann var reyðhærdur, men var ógvuliga sjúkligur og ringur av astma, so hann kundi ikki messa, so hann gjørdist komponistur og ferðandi violinleikari. Tað er ikki lítið hann hevur lagt úr hondum, einar 400 violinkonsertir, 136 kamarkonsertir, 56 kirkjulig kórverk og 46 operair. Men mest kenda verk hansara eru Tær fýra árstíðirnar, skrivaðar yvir yrkingar, sum hann møguliga sjálvur hevur gjørt, men sum nú ikki finnast. Hetta verkið, Tær fýra árstíðirnar, er tað sum nærmast kemur "programm musikki"; tað merkir, at nakað verður myndað við tónleiki. T.d. er veturin kryddaður við staccato í høgu streingja instrumentunum og minna um ísakaldar regndropar, meðan um summarið hoyrist toruslættur. Vit skulu minnast, at hetta er italskt veðurlag hann avmydar.

Hvør partur verkinum hevur tríggjar satsir við einum seinførum satsi millum teir báðar skjótu.

Umframt Tær fýra árstíðirnar er á skránni nakrir vælkendir gimsteinar innan klassiska tónleikin. Fyrst Chaconny eftir Henry Purcell, (1659-1695) eitt sera tignarligt verk úr barokktíðini lagt til rættis fyri strúkarar og cembalo av Benjamin Britten. Tað er soleiðis við barokktónleiki, at hann er "absoluttur", ella tónleikur burturav og hevur oftast bert heiti frá ymsum dansirútmum sum Allemande, Gigue, Pavane, Gavotte o. s. fr. Hetta merkir oftast bert, hvør rútmu sundurbýtingin er. um hon er tvey-, trý-, ella fýradeild ella annað.

Annað verkið er vælkenda Air eftir Johan Sebastian Bach. Verkið er í dag mest kent sum Air fyri g-streingin á fiólini, men upprunaliga var tað skrivað til stuðulsmann hansara Leopold av Anholt, prinsi, umleið 1720 og tá sum partur av størri suitu fyri strúkarar.

Triðja verkið er Sæterjentens Søndag eftir Ole Bull (1810-1880). Ole Bull var norðmaður og var kendur violinsnidlingur, sum ferðaðist um stóran part av heiminum og var næstan eins kendur og Paganini. Verkið, sum verður framført, er eitt sera romantiskt verk, gjørt yvir eina yrking av J. Moe, um gentuna, sum er farin niðan á "sæteren", at ansa neytunum um summarið. Hagar var so langt at ganga, at hon ikki kundi fara omanaftur, men mátti vera har einar tríggjar fýra mánaðir. Nú er sunnudagur, og hon hoyrir kirkjuklokkuna ringja, og so droymir hon um fólkið, sum er á veg í kirkju og serliga um Odd. Har plagdu tey bæði at sita í loynd og eygbera hvønn annan undir gudstænastuni.

Fjórða verkið er eftir enska tónaskaldinum Edward Elgar (1857-1934) og kallast Chanson de Nuit. Heldur løgið, at eitt enskt verk hevur franskt heiti, tí tónasetarin hevði ikki givið verkinum nakað navn, men helt tað kundi kallast vesper, ein katólsk kvøldbøn við sólsetur; men útgevarin Novello helt, at tað fekk størri sølu, um verkið hevði eitt franskt heiti.

Samanumtikið ein sera áhugaverd konsert, sum her verður boðin áhoyrarunum av Føroya Symfoniorkestri.